TILTØK

Frelsunarherurin, Tórshavn
Týsdag kl. 17 og 20 Hornvenjing.
Mikudagin eru øll møtir avlýst vegna jarðarferð.

Hebron, Argir
Mikukvøldið kl. 21 Bibliutími og bønarløta. www.hebron.fo

Samkoman Rhema
Staravegur 5
Týskvøldið kl. 20 Húsmøti hjá Ann Mari og Fríðtór Debes, Bringstún 4, Argir.
Fríggjakvøldið kl. 20 verður JC Teens – spennandi ungdómsmøti har nógv ymiskt er á skránni. Øll ung eru vælkomin.
Sunnudagin verður einki møti vegna túrin til Klaksvíkar.
www.rhema.fo

Filadelfia
Landavegur 22
Í morgin kl. 19 Delli.
Fríggjakvøldið kl. 20 Møti.
Leygardagin kl. 17 Landsbøn.
www.filadelfia.fo

Ebenezer
Týsdagin kl. 17 byrjar frítíðararbeiði aftur.
Mikudagin kl. 17.30 AWANA. kl. 20 Bønar- og uppbyggingarmøti.
Hóskvøldið kl. 20 Ungdómsmøti. Øll eru hjartaliga vælkomin.
Heimasíðan: www.ebenezer.fo

Lívdin
í Hoyvíkar skúla
Týskvøldið samlast húsbólkarnir.
www.livdin.fo

KFUM og KFUK í Havn
Týsdagin kl. 17 í KFUK: Várgleði fyri børn.
Mikukvøldið kl. 19.30 í KFUK: Konfirmantafest, holdini hjá Bergur Debes Joensen og Hera Joensen.

Tórshavnar Hvítusunnusamkoma
Yviri við Strond
Bønarmøti mikukvøldið kl. 20 hjá John Vilhelmsen, Áarrás 9 Argir.

Samkoman Immanuel
Mikukvøldið kl. 20 Møti.

Meinigheitshúsið
Týsdagin kl. 20 Bibliutími, Katekismus.
Mikudagin kl. 19 venur Meinigheitskórið.
Hósdagin kl. 16-17 venur Gentukórið.
Hóskvøldið kl. 20 Ungdómsmøti.
Sunnudagin kl. 14 sunnudagsskúli, kl. 18 Møti við sangbólkinum Gratia.

Saron, Vestmanna
Í kvøld kl. 20 Opið hús fyri ung.
Hósdagin kl. 19 Frítíðararbeiði.
Telefonandaktin 424741.

Missións- og Ungdómshúsið á Glyvrum
www.jesus.fo

Keldan, Skálafirði
Mikukvøldið kl. 20 Felags húsbólkamøti.
Leygarkvøldið kl. 21 Opið hús við Rógva o.fl.
Sunnudagin kl. 17 Møti við Agnar Vestli, frá Levende Ord. Barnamøti kl. 17.
Vælkomin í Kelduna.
www.keldan.fo

Siloa, Fuglafirði
Bøn, bíbliulæra og hugnalig samvera er í Siloa hvørt mikukvøldið kl. 19.30.
Mikukvøldini 22. og 29. okt. talar Karl Jóhan Nielsen.
Evni: Lóg og náði (Galatiabrævið).

Soli Deo Gloria
Hóskvøldið kl. 20 Ungdómsmøti.
Leygarkvøldið kl. 21 Opið hús við luttøku úr Rhema.
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti v/ Rhema.
Mánakvøldið kl. 20 Bønarmøti.

Missiónshúsið í Skopun
Mikukvøldið kl. 20 Bibliutími.
Hóskvøldið kl. 20 kemur Sjómanskvinnuringurin saman. Allar kvinnur eru hjartaliga vælkomnar.

TB-Húsið á Tvøroyri
Evangelisk møtirað verður í TB-húsinum á Tvøroyri 31.10-2.11. Øll eru hjartaliga vælkomin.

Salem, Tvøroyri
Osvald Kjærbo talar á møtinum í kvøld kl. 20. Øll eru hjartaliga vælkomin.

Betel, Vágur
Ónsdagin kl. 20 Uppbyggingarfundur.

Tilhaldið
í Tórsgøtu 21, tlf. 316491
Opið er mánadag 10.00-18.00. Týsdag-fríggjadag kl. 10.00-17.00.
Drekkamunnur er at fáa hvønn dag, eins og bleðini eru til taks.
Mánadagin 20. oktober
kl. 10-10.30 Fimleikur, Sonja Danielsen
kl. 10.30-18 Vit arbeiða í kjallaranum
kl. 14-18 Kortspæl, telving, landastrok, bobbspæl,dart og onnur spæl.
Tilmelding til døgurðan miku- og fríggjadagin, tlf. 316491
Týsdagin 21. oktober
kl. 10-12.00 Vit baka
kl. 10-11.30 Vit syngja – Jóhan R. Jacobsen. Øll eru hjartaliga vælkomin
kl. 14.30 Litráðgevin vitjar, Lydia Petersen
Mikudagin 22. oktober
kl. 10-13.00 Matgerð. Anne Grethe Harlou
kl. 12.00 Døgurði.
kl. 15.00 Túrur, sjá skránna í bleðunum
Hósdagin 23. oktober
kl. 10-10.30 Fimleikur, Sonja Danielsen
kl. 14-17.00 Telduprát
Friggjadagin 24. oktober
kl. 10-13.00 Matgerð, Anne Grethe Hourlou
kl. 12.00 Døgurði
kl. 13-17 Vit virka til jóla

Tað er altið ein krókur í Tilhaldinum – um tygum ikki fáast við nakað ítriv. Vit ynskja at øll skulu kenna seg vælkomin.

Felagið Tórshavn – eftirmeting
Mikukvøldið 22. okt. verður árligi eftirmetingarfundurin. Farið verður av Kunningarstovuni kl. 18.30 til Fuglafjarðar. Petur Martin Petersen sigur frá og aftaná verður rundvísing og eftirmeting í Mentanarhúsinum.
Tilmelding.

Tilhaldið Hugnin í Sandoynni
Tilhaldið í Sandoynni er opið mánadag og mikudag frá kl. 14-17. Báðar dagarnar er drekkamuður at fáa.
Mánadagin 20. okt.
Elisabeth Ellingsgaard heldur fyrilestur um »Hvussu kann ein í góðari tíð fyrireika seg til at gerast eldri«.
Mikudagin 22. okt.
Sólrun CHristiansen lesur 7. brot úr »Sin egen lykkes smed«.

Dagtilhaldið í Vági
er hvønn týsdag og tórsdag frá kl. 15 til 18. Øll eru vælkomin.

Spælistovan í meinigheitshúsinum
er opin mána-, miku- og hósdag kl. 9-12 fyri foreldur við børnum, sum ikki hava ansing.

Føroya Heimavirkisfelag
Postadressa: J. Paturssonargøta 24, 100 Tórshavn.
Formaður: Óluva Vilhelmsen.
T-postur: fhf@craft.fo
Heimasíða: www.craft.fo
Tlf. 322686 / 319629

Reyði Krossur Føroya
Sorgarlinjan svarar mánadag, mikudag og fríggjadag kl. 19.00-21.00 á tlf. 319630.
Kennir tú føroying í Keypmannahavn, ið hevur tørv á vitjan ert tú vælkomin at seta teg í samband við Reyða Kross Føroya, Bryggjubakki 10, 100 Tórsh. tlf. 319630/61 655400.

NA (Anomymir narkomanar)
Reinsarlíð, Tórsgøta 5:
Fundur er hvørt sunnukvøld kl. 20.00 til 21.00.

ACA
(Adult children anonymous).
Fundur fyri tilkomin, ið eru uppvaksin í alkoholiskum ella dysfunktionellum familjum er hvørt leygarkvøld kl. 20.00-21.30 á Tinghúsvegi 37, Tórshavn. www.aca-danmark.dk.
E-mail:
acafaroeislands@hotmail.com

AA-fundir í Havn
Tinghúsvegur 37
Mánadag: kl. 20.00–21.00
Týsdag: kl. 20.00–21.15
Mikudag: Sporafundur kl. 20.00–21.00
Hósdag: kl. 20.00–21.00
Friggjadag: kl. 20.00–21.00 og kl. 22.30–23.30
Leygardag: kl. 9.00-10.00 opin fundur. Kl. 17.00–18.00
Sunnudag: kl. 11.00–12.00.
Allir fundir eru roykfríir.
Heimasíða:
http://heima.olivant.fo/~aa-fo/

Al-Anon
Fundur fyri avvarðandi at alkoholikarum er hvørt týskvøld og hóskvøld kl. 20 í Al-Anon, Tinghúsvegur 37.
Telefontíð er fríggja-, leygar-, sunnu- og mánadag frá kl. 19-21 á tlf. 508030.

AA-fundur í Eysturoy
Á Toftum hvønn týsdag kl. 20 í húsinum norðanfyri skúlan.
Á Glyvrum hvønn fríggjadag kl. 20 í Hvítaskúla. (gamla læraraíbúðin).

AA-fundir í Vágum
Í gamla skúla í Sandavági hvørt hóskvøld og leygarkvøld kl. 19.00 (á loftinum, inngongd niðanfyri).

Al-Anon í Vágum
Fundur fyri avvarðandi hjá alkoholikarum er hvørt týskvøld kl. 19.30 í Gamla skúla í Sandavági.

AA-Suðuroy
AA-fundirnir í gomlu læknamiðstøðini á Tvøroyri eru fríggjakvøld kl. 19 og sunnudag kl. 15.
Hvønn sunnudag síðst í mánaðinum – opin fundur kl. 15.

AA í Vági
AA fundir verða í Undirhúsinum onsdag og leygardag kl. 19.00.

Blái Krossur – Glyvrar
bjóðar til eftirviðgerðarfund hvørt mánakvøld kl. 19 í hølunum hjá Bláa Krossi á Glyvrum.

Blái Krossur – Eiði
bjóðar til eftirviðgerð í Losjuni á Eiði annaðhvørt týskvøld kl. 20. Meira fæst at vita á tlf. 315575.

Náttarravnarnir í Tórshavn
Tín stuðul ger mun! Blív limur ella gang ein royndartúr. Ringið Carl 215570, Guðrið 220019, Hans Jákup 217818, Tone 261165, Ella 316261, Arni 222552

Lymfødemfelagið
Box 2113, FO 165 Argir
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð. Samband fæst við felagið á tlf. 448454, Fía í Túni, ella tlf. 313424, Arnhild Johannesen.

Føroyskir fiskimenn uttanlands
tlf. 21 04 95.
Felagið fyri føroyskar fiskimenn í Canada, Svøriki, Danmark, Íslandi og Noregi.
Limagjald 200 kr. um árið.
Postgiro 57894. Fø.
Sparikassi 442027-8.

Felagið fyri lesi- og skriviveik
Postadr.: MBF-Húsið
Íslandsvegur 10c
Endamál felagsins er at hjálpa teimum ið hava lesi- og skrivitrupulleikar.
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð men samband fæst við felagið á tlf. 441541, Anne Karin Kjeld og 318867, Laila Egholm.

Heilafelagið, MBF-húsið
Íslandsvegur 10C
tlf./fax 321520
Telefontíð hvønn týsdag kl. 18.00-20.00.

Parkinsonfelagið
MBF-húsið, Íslandsvegur 10C
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð, men samband fæst við felagið hjá Kristinu, tlf. 317317.

Giktafelag Føroya
Íslandsvegur 10 C
FO-100 Tórshavn
T-post: gikt@gikt.fo
www.gikt.com
Skrivstovan: Tlf. 31 02 37
Opið: tís- og hósdag kl. 11.00-14.00.
Fibromyalgibólkurin: Opið mánadag kl. 11.00-13.00.
Foreldraumboð:
Nicolina Højgaard, heilsusystur tlf. 31 47 50
Ungdómsumboð: Sára Tummassardóttir tlf. 37 31 06.

Deyvafelag Føroya
Íslandsvegur 10B
Skrivstovan er opin mánadag til hósdag frá kl. 10.00 til kl. 15.00. Tlf. 317597, fartlf. 222381, skrivitlf. 316929 fax 313609 og teldupostadr. deaf_fo@post.olivant.fo
heimasíðan: www.deaf.fo

Kvinnuhúsið
svarar alt samdøgrið á tlf. 317200. Skrivstovan er opin frá kl. 10 til 17, og hósdagar til kl. 21. Ráðgevingin er hóskvøld eftir avtalu.

MBF – Meginfelag teirra brekaðu
Íslandsvegur 10c
FO-100 Tórshavn
Skrivstovan er opin allar gerandisdagar millum kl. 09.00 og 16.00. Tlf. 317373, fartlf. 264839 faks. 310813
Teldupostur: mbf@mbf.fo
Heimasíðan: www.mbf.fo

Alzheimerfelagið
Tórsbyrgi 16
100 Tórshavn
Heimasíða: www.alzheimer.fo
t-postur: sigmo@post.olivant.fo
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð, men samband fæst við felagið á tlf. 313102.
Demenslinjan er telefonráðgeving í øllum viðvíkjandi demens. Tlf. 313102 svarar týsdag kl. 18–20.

Sinnisbati
Íslandsvegur 10 C, 100 Tórsh.
tlf. 322544 · Fax 310813
T-postur:
sinnbati@post.olivant.fo
Skrivstovan er opin mikudag frá kl. 16.00-18.00. Fyrsta mikudag í mánaðinum er opið til kl. 19.30.
Tú ert vælkomin at ringja og spyrja um alt, sum hevur við sinnistrupulleikar at gera á tlf. 322544.

Cøliakifelag Føroya
Postadr.: MBF-húsið,
Íslandsvegur 10C.
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð, men samband við felagið fæst við at ringja til onkran av nevndarlimunum: Annegreta tlf. 448664
Beinta tlf. 310574
Henning tlf. 314783.

Føroya Felag Móti Krabbameini
Grønlandsvegur 58, Tórshavn
Telefontíð mánadag til fríggjadag frá kl. 13-15.
Tlf. 317959.
Teldupost: ffk@post.olivant.fo
www.ffk.fo

Epileptikarafelag Føroya
Postadr.: MBF-húsið, Íslandsvegur 10 C. Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð, men samband við felagið fæst á tlf. 313978, Randfríð Sørensen, ella tlf. 319793, Mari Johannesen.

Nýrafelagið
Postsmoga 1063
110 Tórshavn.
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð, men samband fæst við felagið á e-mail: thomsen1@post.olivant.fo
Tlf. 315928, Odny
Tlf. 315786, Karin Elisa
Tlf. 314796, Hallbjørg

Føroya Astma/Allergifelag
MBF-húsið, Íslandsvegur 10c,
Tlf./fax 311419.
Upplatingartíðirnar eru: hvønn hósdag kl. 16.30-18.

Amnesty International, Føroya deild
Tinghúsvegur 18, 4. hædd
Tlf. 315816
Skrivstovan er opin mánadag frá kl. 13.00-17.00 og mikudag frá kl. 9.30-17.30.
Heimasíðan: www.amnesty.fo
Teldupost: Amnesty-Amnesty.fo

V4-dráttur
í drátti nr. 1509
18. okt. 2003

Tølini: 7 - 11 - 12 - 13 - 14 - 16 - 40 - 44 - 47 - 52 - 58 - 59 - 68 - 74 - 77 - 82

Eingin vinnari

Eykavinningur
Seðlarnir til henda dráttin luttaka eisini í eykaspælinum í oktober, har eykavininngurin er 150.000 krónur. Drigið verður í oktoberspælinum leygardagin 25. okt.

Sosialurin tekur onga ábyrgd av moguligum villum

PRÓGV

Tann 8. okt. fekk Magnus Samuelsen, Tórshavn, prógv á Aalborg Universiteti við samfelagsfrøði sum høvuðsfaki og søgu sum siðufak.

BRÚDLEYP

Leygardagin 8. november kl. 15 giftast í Nebo á Toftum, Oddvá Kristiansdóttir, Saltnes og Mortan Hansen, Glyvrar. Veitslan verður í Bygdarhúsinum í Leirvík kl. 18.30. Tey, ið vilja gleða brúðaparið við at koma, verða biðin um at siga frá á tlf. 448319, 448096 ella 222402 áðrenn 25. okt.

80 ÁR

Týsdagin 21. okt. fyllir Ebba Adam, Klaksvík, 80 ár. Dagurin verður hildin saman við familjuni.

VIÐMERKINGAR

Ódámliga føroyska søgufalskingin

Virgar T. Dalsgaard

Í sambandi við, at eg fyri trimum árum síðani skrivaði eitt lítið søgubrot um bumbingina av okkara aldargamla lóggávutingi 18. september 1945, fekk eg hópin av fyrispurningum frá yngri fólki um, hvat orsøkin kann vera til, at tey ongantíð hava fingið slíkt at vita fyrr – t.d. táið tey sjálvi gingu í skúla. Og nú havi eg aftur fingið nógvar reaktiónur frá fólki, sum bæði eru bilsin og skelkaði um tað, sum eg skrivaði í greinini *»Ambivalentir moralistar«* í bløðunum 1. oktober í ár. Ein fastur táttur, sum gongur aftur hjá næstan øllum, sum ringja til mín, er, at tey fregnast eftir, hví hesir tilburðir ikki eru komnir at standa í teimum søgubókum, sum verða brúktar í føroyskum skúlum í dag.

Hetta eru sjálvandi relevantir og álvarsamir spurningar, sum áttu at verið beindir til føroyskar skúlamyndugleikar. Hví letur man framvegis menn sleppa at skriva subjektivar søgubøkur, sum *leypa um* alt tað, sum er skammiligt og pínligt fyri fullveldisrørsluna? Hví skal man framleiða eitt glansbílæt av hesi ódámligu rørslu?

Hví verður t.d. feudali høvuðskamburin Jóannes Patursson idylliseraður og gjørdur til ein positivan karikatur av veruleikanum – tann maðurin, sum stóð á odda fyri tí eina *mest* ódemokratiska álopi, sum nakrantíð er framt á okkara løgting, táið hann biddaði og bønaði *danska* kongin Christian Tiggjunda og statsministaran Thorvald Stauning í 1937 um at upploysa okkara lógliga valda *føroyska* ting og senda tingmanningina heim, bara tí meirilutin ikki var samdur við honum? Hví verður ikki sagt ungum fólki frá, at tað vóru hesir báðir *donsku* menn, sum tá gjørdu demokratiskan manngarð um føroyskt fólkavald og vardu føroyska tingmeirilutan móti egoistiskum harraboðum frá ráðarika og ódemokratiska kongsbóndanum?

Ræðast søgumenn tann ódemoktatiska køstin? Hví verður harðrendi og kyniski politikkur fullveldismanna romantiseraður og idylliseraður? Hví skal ódemokratiski atburður teirra krógvast fyri yngri ættarliðum? Er eingin, sum *torir* at skriva objektivar og ópolitiskar skúlabøkur, sum ikki eru søguligur kosmetikkur?

Hvat kann gerast?
Ja, so leingi, sum vit ikki hava hesar søgubøkur ella annað objektivt skúlatilfar, og so leingi sum fjølmiðlarnir eru eiðasørir til at taka upp tann táttin, sum vísir ódemokratisku framferð fullveldismanna, eru eingi onnur ráð enn at tit, sum ung og forvitin eru, sjálvi fara at gera kanningar.

Fyri tað fyrsta er nógv tilfar at fáa úr bløðunum – bæði Dimmalætting, Sosialurin og Tingakrossur eru rættiliga góð søgulig vitni um hesa óhugnaligu tíðina. Serliga er umráðandi at festa seg við tíðina frá tí, at Jóannes Patursson fer úr sjálvstýrisflokkinum og yvir í fólkaflokin stutt fyri kríggið og dygst fram til løgtingsvalið heystið 1950.

Fyri tað næsta mugu tit eggja og stimbra reiðiligum føroyskum skúlamonnum til at fara undir meira objektiva søguliga upplýsing, t.d. við at brúka søguligt blaðtilfar. Avbera ófatuligt er fyri meg, at ikki øll føroysk bløð langt síðani *in extenso* eru løgd út á Alnótina (Internetið). Orka blaðeigararnir ikki at figgja hetta tiltak, má landið gera tað, so vanligt fólk fær fulla atgongd til alt blaðtilfar frá farnu øld!

Men *tíanverri* vóru nógvar hendingar, sum *aldri* komu í bløðini; bløðini kunnu sjálvsagt heldur ikki so væl tolka ta hatsku atmosferuna, sum var nógva staðni kring landið.

Á veljarafundum var viðhvørt so ódámligt, at tað var beinleiðis lynch-stemningur! Ofta hoyrdust á almennari gøtu grovar hóttanir móti sambandsfólki um repressaliir og hevnd! Hetta kom heldur ikki altið í bløðini. Lat meg nevnda onnur viðurskifti, sum ikki komu í bløðini:

Tað var rættiliga vanligt, at menn vóru politiskt trýstir við ómenniskjansligari figgjarligari kúging. Raskir trolaramenn, sum ikki duldu fyri, at teir vóru javnaðarmenn, vóru frá hond koyrdir í land eftir boðum frá útgerðarmonnum úr loysingarflokkinum. Dømi eru um, at menn, sum ikki áttu sýru í vegg, fingu næstan óavmarkað lán í Sjóvinnubankanum, bert tí teir vóru limir í loysingarflokkinum, meðan sambandsmenn, hóast teir vóru kredittverðir, fingu kortanei til lánveiting! Teir seinnu fingu tó góðar sømdir í hinum bankanum, Føroya banka! Slíkur yvirgangur kom sjáldan á prent, tíverri!

Fyri at fáa nærri og grundigari upplýsingar um hesi viðurskifti mugu tit fara at tosa við tey eldru ættarliðini, sum enn eru á lívi og eru fús at vitna; – best er at tosa við tey, sum í dag eru farin um 70 ella 75 ár – tit mugu geva tykkum góða tíð, hava bandupptakara við og so lata tey eldru fortelja og minnast. Gera tit hetta arbeiði, sum søgumenn langt líðani áttu at gjørt, varðveita tit gott keldutilfar av eygleiðingum og vitnisføstum frágreiðingum, sum fullveldismenn og núverandi fjølmiðlaliðið ætla at feia langt inn undir *tað søguliga gólvteppið!* Helst skulu *allir* pínligir upplýsingar um loysingarrørsluna fara undir flag. Hetta er fjalda dagsskráin! Tað hastar við at fáa tey søguligu krúnvitnini at úttala seg, áðrenn ov seint er!

Illusiónin um kúging
Íslendingar hava eisini leingi havt eina forfalskaða søgu, og hjá teimum eins og hjá okkum ráddi um at byggja upp eina mytu um, at teir vóru kúgaðir av dønum, tí annars kundi ikki framalast ein loysingarvilji í fólkinum. Í dag eru fleiri ungir íslendskir søgumenn, sum tora at taka upp henda táttin um danskaratíðina, har teir júst hava ávíst, at tað ongantíð var nøkur donsk kúging í Íslandi – tvørturímóti, so vardu danskir embætirmenn oftast íslendsku almúguna móti yvirgangi frá teirra egnu landsmonnum, teimum ráðandi stórættunum. Dømi eru um, at íslendingar fingu send fólk niður til tvangsarbeiði og revsingar á Bremarhólmi í Danmark langt aftaná, at danir vóru givnir við slíkari revsing. Tað var tí, at íslendingar vildu sleppa sær undan hesum »besverligu« landsmonnum. Sum ikki einaferð mátti Danmark *verja íslendingar móti ødrum íslendingum!*

Tað er ikki væl dámt av øllum í Íslandi, at henda søguliga avdúking verður gjørd! Men slíkt arbeiði *má* gerast – tá ið íslendskir søgumenn tora, máttu okkara søgumenn eisini tort. Vit høvdu ein, sum tordi – *John Davidsen* – hann er tíverri farin!

Støðan hevur nevniliga verið næstan tann sama í Føroyum. Tað skuldi skapast ein myta og ein paranoidur tvangstanki um, at danir ella Gabelsmenn høvdu kúgað okkum, sjálvt um tað lættliga tvørsøguliga kann ávísast, at føroyingar høvdu tað betri bæði í 17. og 18. øld enn danskir bøndur um somu tíð.

Bara í danska býnum Køge, sum hevði minni fólkatal enn Føroyar, vóru brendar 26 kvinnur á heksabáli. *Ikki ein* tann einasta kvinna varð brend í Føroyum, tí skilagóðir danskir embætismenn ikki vildu rætta seg eftir nøkrum slatri, túnatosi ella lynchstemningi.

Hjá okkum vardu danskir embætismenn ofta føroyska smámannin móti kongsbøndrum, eitt nú tí sjálvsøkna Nólsoyar Páll, sum kúgaði vanligar føroyingar. Í dag royna loysingarmenn at gera Nólsoyar Páll til eina hetju, hóast søgukøn fólk væl vita, at hann bara arbeiddi fyri seg sjálvan og eitt lítið lið av stórbøndrum, sum *hann* nevndi *føroyingar,* meðan hann gjørdist púra hysteriskur um tað, at Løbner fekk skipað fyri, at fátækir havnarmenn (vóru teir ikki føroyingar?) fingu jørð til traðir frá Kirkjubiggjargarðinum, so at teir kundu velta og fáa sær kúgv. Tað var sanniliga frælsi fyri hesar smámenn og teirra børn at fáa ein mjólksopa. Hetta kallaði superegoisturin Nólsoyar Páll kúging. Hesin óbeskedni maðurin, sum í tí søgufalskandi Fuglakvæðinum ger seg sjálvan til hetju, meðan Løbner og aðrir danir verða gjørdir til bølmenni – *heilt* uttan søguliga kjølfestu!

Tá ið eg gekk í skúla vóru tíbetri nógvir føroyskir lærarar, sum vóru samvitskufullir, og sum vóru nóg gamlir til sum krúnvitni at minnast nógv av yvirganginum, sum hevur verið í føroyskum sonevndum fullveldispolitikki. Hesir menn tordu og syrgdu fyri, at vit fingu eina nuanceraða vitan um roktíðina *undan* kríngum, *undir* kríngum og beint *eftir* kríggið. Og hesir lærarar vóru ein góð kontravekt móti teimum frelstu loysingarlærarum, sum tíanverri *eisini* vóru tá – teir loysingarprofetar, sum royndu at intoktrinera og manipulera okkum við politiskum daddusøgum! Ungdómur, sum fær avbalanceraða holla vitan um søgutilburðir, er væl vaccineraður móti ábyrgdarleysum fantastum og dagdroymarum. Tað er ein óupplýstur og lítið vitandi ungdómur ikki! Fremsti forútsetningur fyri at sleppa undan manipulatión og politiskari indoktrinering er holl information og ócensureraðri tíðindi. Tað er tí av lívsneyðugum týðningi, at føroyskur skúlaungdómur í dag fær alt keldutilfar á borðið! Kenna søgumenn og fróðskaparsetrið ikki vitjunartið sína, ella eru teir ov ræddir, mugu fólk *sjálvi* av sínum eintingum fara og savna inn neyðugt keldutilfar – ongantíð ov skjótt!

HAVNAR BIO
P Tlf. 311956 P
www.bio.fo

Týsdagin 21.10. kl. 18³⁰ Týsdagin 21.10. kl. 20³⁰
Mikudagin 22.10. kl. 18³⁰ Mikudagin 22.10. kl. 20³⁰
Hósdagin 23.10. kl. 18³⁰ Hósdagin 23.10. kl. 20³⁰

Týsdagin 21.10. kl. 19¹⁵ Týsdagin 21.10. kl. 22³⁰
Mikudagin 22.10. kl. 19¹⁵ Mikudagin 22.10. kl. 22³⁰
Hósdagin 23.10. kl. 19¹⁵ Hósdagin 23.10. kl. 22³⁰

Týsdagin 21.10. kl. 22¹⁵ Mikudagin 22.10. kl. 22¹⁵
Hósdagin 23.10. kl. 22¹⁵ – *Seinasta sýning*

KOMANDI FILMAR

Frumsýning
Fríggjadagin 24.10. kl. 19⁰⁰ Fríggjadagin 24.10. kl. 21¹⁵

Frumsýning
Fríggjadagin 24.10. kl. 20¹⁵ Fríggjadagin 24.10. kl. 23³⁰

Stórt úrval av DVD-filmum til sølu